## Selt nógvan laks

Ta seinastu vikuna hava keyparar í ES-londunum keypt nógvan norskan laks til páskar, soleiðis at í síðstu viku fóru 10.000 tons av norskum laksi á ES-marknaðin, skrivar Nordlys. Kiloprísurin var 29,17 norskar krónur í meðal, og tað var umleið ein hálv króna lægri enn í næstsíðstu viku. Umframt tann feska laksin hava norðmenn selt góð 700 tons av frystum laksi til ES-marknaðin ta seinastu vikuna fyri 27,20 norskar krónur í meðal.



## Jólamaðurin fær sítt

Uttan fyri Grønlandi verður jólamaðurin mettur sum tað best kenda umboðið frá Grønland, og hann hevur eisini fingið fíggjarligan stuðul á grønlendsku fíggjarlógini. Men í ár ætlaði landsstýrið at strika jólamannin. Tað gekk kortini ikki, tí ein stórur meiriluti í Landstingnum samtykti at kanna, um tað ikki ber til at finna pening til jólamannin kortini. Nú skal vinnunevndin hjá Landstinginum finna teir neyðugu pengarnar.

Jacob Vestergaard, landsst‡risma›ur í útlendingamálum:

# Nýggjar mannagongdir seinkað viðgerðini

**Innlendismálaráðið setti í august/september síðsta ár nýggjar mannagongdir í verk í sambandi við viðgerð av umsóknum um uppihalds- og arbeiðsloyvi. Viðgerðirnar ganga munandi skjótari nú, men høvdu ávísar seinkingar við sær í fyrstani.**



*Jacob Vestergaard, landsst‡risma›ur vi› útlendingamálum, sigur, at tørvurin á arbei›smegi innan ávísa starvsøki› er avgerandi fyri, um umsóknir um uppihalds- og arbei›sloyvi ver›a positivt ella negativt ummæltar.*

ÚTLENDINGAMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Vit skrivaðu í blaðnum í gjár um maltesaran Savior Missut og teir trupulleikar, hann hevði í sambandi við umsókn um uppihalds- og arbeiðsloyvi í Føroyum. Greiningreiddinágreiniliga frá, hvussu hann og føroyska familjan hjá gentu hansara vóru farin fram í málinum, og hvørjar trupulleikar tey høvdu havt við at fáa umsóknina viðgjørda.

Og nú er so greitt, at Innlendismálaráðið ikki vil viðmæla umsóknini, sum nú er til endaliga viðgerð í danska Udlændingestyrelsen.

Jacob Vestergaard er landsstýrismaður í Innlendismálaráðnum, ið umsitur útlendingamál. Hann sigur, at hann sjálvandi ikki kann gera viðmerkingar til nakað einstakt mál, men vísir á, at tey í Innlendismálaráðnum í fjør heyst nettup broyttu mannagongdirnar í sambandi við umsóknir um uppihalds- og arbeiðsloyvir til tess at stytta um avgreiðslutíðina.

– Hesar broytingarnar vórðu settar í verk í august/september mánaði í fjør og hava ført við sær, at viðgerðartíðin er stytt munandi. Sjálvandi vóru ávísir trupulleikar at byrja við sum førdu við sær, at summi mál drógu nakað út, og summi mál komu eitt sindur skeivt fyri, sigur Jacob Vestergaard.

### Søkja í heimlandinum

Helena Jacobsen, ið er unnusta hjá umrødda Savior Missut, segði í blaðnum í gjár, at tey høvdu kannnað gjølla framman undan, hvussu tey skuldu bera seg at í sambandi við innlating av umsókn um uppihalds- og arbeiðsloyvi til maltesaran, og at tey allastaðni fingu at vita, at umsókn og onnur viðkomandi pappírir skuldu latast danska Udlændingestyrelsen.

Men Jacob Vestergaard sigur, at tá søkt verður um arbeiðsloyvi í Føroyum, skal umsóknin latast inn í heimlandinum, og ein skal tryggja sær, at ein slík umsókn er játtað, áðrenn komið verður til Føroya.

Landsstýrismaðurin vísir á, at tá útlendingar søkja um arbeiðsloyvi í Føroyum, hava tey í Innlendismálaráðnum greiðar lógir at ganga eftir. Og hesar lógir siga millum annað, at »væsentlige beskæftigelsesmæssige hensyn« skulu takast í sambandi við arbeiðsloyvir til útlendingar.

Uttan at vilja koma inn á konkreta dømið sigur Jacob Vestergaard, at er ikki tørvur á arbeiðsmegi innan økið, har útlendingurin søkir starv, hava tey ikki annað val enn at mæla frá, at viðkomandi fær arbeiðsloyvi í Føroyum.

### Familjusamanføring ein møguleiki

Tað ber altso út frá hesum til at staðfesta, at hevði maltesarin søkt um starv innan annað starvsøki, har ávísast kann, at tørvur er á arbeiðsmegi, hevði ummælið frá Innlendismálaráðnum helst verið positivt.

Men ein annar møguleiki finst, og tað er familjusamanføring. Hetta varð eisini nevnt í blaðnum í gjár, men av givnum orsøkum hevði Missut altso valt ikki at ganga ta leiðina.

– Tá talan er um familjusamanføring er viðgerðin ein heilt onnur. Tá er eisini talan um heilt aðrar fortreytir, ið skulu uppfyllast. Hvussu familjuviðurskiftini eru, um fólk eru gift, hvussu leingi tey hava livað saman o.s.fr., sigur Jacob Vestergaard.

Landsstýrismaðurin sigur, at tá útlendingar fáa uppihaldsloyvi umvegis familjusamanføring, eru teir at meta á sama føti, sum allir vanligir føroyingar, og kunnu tá arbeiða uttan avmarkingar eins og aðrir føroyingar.

Sum skilst er tað neyvan nøkur forðing at søkja um familjusamanføring, hóast umsókn um uppihalds- og arbeiðsloyvi er til viðgerðar – bara treytirnar annnars eru uppfyltar.

Tjóðveldisflokkurin í uppskoti:

## Yvirtakið útlendingalógina

**Ógvuliga apropos umrøðuna av trupulleikunum í sambandi við umsóknir hjá útlendingum um uppihalds- og arbeiðsloyvi, legði Høgni Hoydal vegna Tjóðveldisflokkin í gjár fram uppskot um, at yvirtaka útlendingalógina, so hon verður føroysk burturav.**



*Høgni Hoydal vil hava útlendingalógina at verða reint føroyska – ella at lata danir einsamallar umsita hana!*

ÚTLENDINGAMÁL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er einki at ivast í, at ein stórur trupulleiki í sambandi við útlendingamál er, at málið skal viðgerðast bæði her heima í Føroyum og í danska Udlændingestyrelsen.

Tað sigur seg sjálvt, at ein slíkur framferðarháttur bara kann verða við til at draga mál út og skapa iva. Tað er nóg ringt, tá mál verða send aftur og fram sum »bukka millum sengur« millum føroyskar stovnar, so ein kann bara ímynda sær skilið, tá málið ferðast millum lond.

Høgni Hoydal segði millum annað, tá hann legði málið fram, at vit sjálvandi skulu vera varin at lata upp fyri útlendskari arbeiðsmegi, men at tað er alneyðugt, at lógin gerst smidligari.

– Útlendingar, sum søkja um uppihalds- og arbeiðsloyvi í Føroyum, eru í dag í einum ongamannalandi. Eingin veit rættiliga, hvar ábyrgdin liggur, og tað kunnu vit ikki liva við, segði Høgni Hoydal.

Hann vísti á tað øðrkymlandi í, at umsóknin varð send aftur og fram millum ikki bara ymsar stovnar, men eisini millum ymisk lond.

### Reint føroyskt ella…

Framsøgumaður Tjóðveldisfloksins í hesum uppskoti segði, at serliga stórir trupulleikar stóðust av, at lógin var so stirvin.

– Vit mugu fáa eina smidligari lóg, serliga tá talan er um at skifta arbeiðspláss hjá útlendingunum. Vit kunnu taka eitt dømi, har eitt virki fer í gjaldssteðg og síðani verður yvirtikið av nýggjum eigarum. Teir útlendingar, ið hava starvast á virkinum, noyðast at søkja um arbeiðs- og uppihaldsloyvi av nýggjum, sjálvt um tað í prinsippinum er sama starv og sami arbeiðsgevari, teir arbeiða hjá, segði Høgni Hoydal.

Víðari vísti formaður Tjóðveldisfloksins á, at málið er klárt at yvirtaka.

– Kostnaðurin fyri at umsita umsóknir um uppihalds- og arbeiðsloyvi umframt familjusamanføring er 3,5 mió. kr. Flóttafólkaspurningurin er hjá okkum næstan ikki til, og sammetta vit okkum við onnur norðurlond, hevði okkara partur av flóttafólkum verið 40 seinastu 20 árini, segði Høgni Hoydal.

Allir framsøgumenn tóku væl ímóti uppskotinum, og eisini landsstýrismaðurin er positivt sinnaður fyri einari yvirtøku. Hann vísir tó á, at ein yvirtøka krevur fyrireikingar og serliga at greina, hvat vit vilja við okkara útlendingapolitikki.

Høgni Hoydal er tó ikki í iva:

– Er ætlanin ikki at fáa eina reint føroyska útlendingalóg, so eiga vit at lata hana verða reint danska!